www.apotek.fo
Apoteksverkið

# Skamtan av heilivági

## Kunning til brúkara



# HVØR SKAMTPOSI ER TÝÐILIGA MERKTUR VIÐ NAVNI, FØÐINGARDEGI, INNIHALDI Í POSANUM, OG NÆR HEILIVÁGURIN SKAL TAKAST.





## Hvat er skamtan?

Skamtan er ein hjálp hjá brúkara, ið tekur fleiri sløg av heilivági ymiskar tíðir av samdøgrinum, ella av øðrum grundum tørvar hjálp í sambandi við heilivágin, sum tikin verður.

Skamtan merkir, at tann heilivágur sum sjúklingurin tekur verður maskinpakkaður í skamtir. Pakkað verður í smáar skamtposar úr plasti, og í hvørjum posa er heilivágurin, ið tikin verður samstundis. Á skamtposunum, sum hanga saman, er tilskilað nær innihaldið skal takast. Pakkað verður til tvær vikur. Tær vanligu forskriftirnar (reseptirnar) verða útskiftar við skamtanarforskrift, sí miðsíðuna í faldarinum, ið sostatt kemur í staðin fyri allar aðrar forskriftir.

Hvør skamtposi er týðiliga merktur við navni, føðingardegi, innihaldi, og nær heilivágurin skal takast. Hetta tryggjar, at rættur heilivágur verður tikin rætta tíð.

**Í SKAMTAN VERÐUR HEILIVÁGURIN PAKKAÐUR TVÆR VIKUR ÍSENN**



## Mannagongd, tá ið byrjað verður við skamtan

Læknin skrivar skamtanarforskriftina og sendir apotekinum hana. Vil brúkari skamtan, setur hann ella heimatænastan seg í samband við læknan og biður um at koma í skipanina.

Heilivágurin, ið verður skamtaður, verður pakkaður til tvær vikur í senn. Avtalað verður frammanundan, um tann pakkaði heilivágurin verður:

1. heintaður á apoteki
2. sendur heim
3. sendur sambýli ella ellisheimi

**LÆKNIN SKRIVAR SKAMTANARFORSKRIFTINA OG SENDIR APOTEKINUM HANA.**

**DREKKIÐ RÍKILIGT AV VATNI AFTURVIÐ HEILIVÁGNUM!**

# Leiðbeining um hvussu skamtposin verður upplatin

**Skræðið posan av**

Millum posarnar eru smá hol
Skræðið posan, sum skal nýtast, eftir holunum




**Posin verður latin upp**

Skræðið síðuna á posanum (sí pílar) fyri at lata hann upp
Ansið eftir ikki at skræða posan úti við hornini




**Góð ráð**

Tømið innhaldið í posanum niður í ein tóman kopp ella eitt tómt glas



Drekkið altíð nógv vatn saman við heilivági

**Apoteksverkið**
**R. C. Effersøesgøta 31**
**FO-100 Tórshavn**
**Tlf: 341100 Fax: 341192**

# Skam

| **Navn:** | **Stovnur:** | **Kontaktpe** |
|---|---|---|
| | | **Heilivágur**<br>1 = KL. |

| **Viðgerð byrjað:**<br>Dagfesting og læknanr. | **Heilivágur:**<br><br>Vøruheiti og styrki | **Skamtur:**<br>1 | <br>2 |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | **Íalt:** | | |

HAVIÐ ALTÍÐ SKAMTANAR-FORSKRIFTINA VIÐ, TÁ FARIÐ VERÐUR TIL LÆKNA!

| **Tilskilað apotekinum** | | **Eftirlit** | **Kunda dag** |
|---|---|---|---|
| **Dagfesting** | **Undirskrift farmaseutsins** | | |

**Viðmerkingar hjá viðskiftafólki/stovni um annan heilivág, ið ikki verður pakkaður**

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

# tanarforskrift Telefax ☐

| rsónur: | |
|---|---|
| latast<br>2 = KL. 3 = KL. 4 = KL. | |

| 3 | 4 | At geva fyri (indikatión) | Nýggj ordinatión dagfesting | Avskamtan (seponering) dagfesting | Broytt skamtan dagfesting | Kvittan lækni |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |

Dagfesting og undirskrift læknans

| mappa førd | Skamtanarkortið er gjørt av: | Seinast broytt: | Er galdandi til: | Útgáva |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |

## Skamtanarforskrift (resept)

Skamtanarforskriftin kemur í staðin fyri vanligu forskriftirnar. Á skamtanarforskriftini eru øll sløgini av heilivági, og hvussu og nær hann skal takast. Hvørja ferð, læknin broytir heilivágin hjá brúkara, verður nýggj skamtanarforskrift útskrivað.

## Betri yvirlit

Skamtanarforskriftin er eitt heildaryvirlit yvir heilivágin hjá brúkara. Hetta ger tað léttari at taka heilivágin, á rættan hátt, og minkar um møguleikan fyri, at tikin verða heilivágssløg, ið ikki passa saman.

**HAVIÐ ALTÍÐ SKAMTANARFORSKRIFTINA VIÐ TIL LÆKNA!**

## Broytingar

Skamtanarforskriftin er galdandi í tvey ár.
Hvørja ferð heilivágurin verður broyttur, verður skamtanarforskriftin longd tvey ár.
**Um ongin broyting er gjørd, er óneyðugt at endurnýggja forskriftir í tvey ár.**

Tá ið læknin ger broyting í skamtanarforskrift, kemur henda broyting við næstu ferð pakkað verður.
**Um læknin ger vart við, at hetta ikki kann bíða, verður heilivágurin pakkaður fyrr.**

## Tvey ár uttan broyting

Er heilivágurin óbroyttur í tvey ár, skal brúkarin seta seg í samband við læknan og biðja um at fáa nýggja skamtanarforskrift. Verður hetta ikki gjørt, áðrenn skamtanarforskriftin rennur út, steðgar pakkingin.

Áminning verður send tríggjar mánaðir, áðrenn skamtanarforskriftin rennur út. **Hevur apotekið eingi boð fingið frá lækna, verður áminning send aftur ein mánað, áðrenn skamtanarforskriftin rennur út.**

SKAMTANARFORSKRIFTIN GEVUR TÆR, AVVARÐANDI, LÆKNANUM OG HEILSUSTARVSFÓLKI EITT HEILDARYVIRLIT YVIR HEILIVÁGIN SUM TÚ TEKUR.

## Skjalamappa

Brúkarin fær eina mappu við avriti av skamtanarforskriftini. Í mappuni eru myndir av tablettum / hylkjum, umframt upplýsingar frá framleiðara um heilivágin.

## Hvat kostar tað at fáa skamtaðan heilivág?

Somu treytir eru galdandi fyri smamtaðan heilivág, sum fyri annan heilivág. Um Heilsutrygd gevur tilskot til heilivágin, verður gjaldið fyri hvørt 12 mánaða tíðarskeið í mesta lagi:

**1.317,35 kr.** fyri fólk 67 ár og eldri
**2.059,85 kr.** fyri fólk 18 - 67 ár

Gevur Heilsutrygd hinvegin **ikki** tilskot til heilivágin, kann gjaldið fara upp um nevndu mørk. Tá kann læknin í onkrum førum søkja um sertilskot til heilivágin fyri hvønn einstakan brúkara.

## Hvussu verður goldið?

Treytin fyri at vera við í skamtanini er, at goldið verður við sjálvvirkandi bankaflyting. Apotekið sendir brúkaranum eina áheitan um at fylla út skjal til peningastovn.

## Tá ið farið verður at ferðast

Apotekið kann pakka niðurfyri, um sagt verður frá í góðari tíð **(minst 1 mánað frammanundan).**

**ER IKKI TØRVUR Á SKAMTAÐUM HEILIVÁGI VEGNA INNLEGGING Á SJÚKRAHÚS, EIGUR APOTEKIÐ AT FÁA HETTA AT VITA SUM SKJÓTAST.**

## Hvør heilivágur kann pakkaðast í skamtposa?

Bara hylkir og vanligar tablettir kunnu verða pakkað í skamtposa. **Tað er, at upploysiligar tablettir, smeltitablettir og allar aðrar tablettir, ið laga (kunnu draga til seg vætu), verða ikki pakkaðar.**

Antibiotika, kynshormon og cytostatika verða ikki pakkað. Náttúru-heilivágur og kostískoyti, (t.d.vitaminir) verða tikin við eftir fakligari meting. **Hetta verður kortini bara gjørt í avmarkaðan mun.**

**HESAR TABLETTIR VERÐA IKKI PAKKAÐAR: UPPLOYSILIGAR TABLETTIR, SMELTITABLETTIR OG AÐRAR TABLETTIR IÐ LAGA**

## Innlegging á sjúkrahús

Í sambandi við innlegging á sjúkrahús er neyðugt, at apotekið fær boð um hetta sum skjótast, so at pakkingin verður steðgað. **Annars heldur pakkingin fram sum vant, og goldið verður fyri pakkingina.**

Í sambandi við útskriving, skal apotekið hava boð sum skjótast. Verða broytingar gjørdar í heilivágnum, skal læknin boða apotekinum frá. Av tí at apotekið pakkar til 14 dagar í senn, kunnu ganga 14 dagar, áðrenn pakkingin er klár. Vil læknin hava, at brúkarin skal fáa heilivágin fyrr, skal verða gjørt vart við tað.

www.apotek.fo

Apoteksverkið

Juni 2017

